Tórhallur av Oyrabakka:

# Pápi reinsaði motorar við landi

**Heima í Norðskála blivu tey 14 systkin. Menninir í húsinum blivu kendir sum framúr skiparar og motorpassarar. Undir fyrra heimsbardaga kom Andrias, pápi Tórhall, at seta í verk eitt hugskot um at reinsa motorar við landi. Ein møguleiki sum vísindin kannaði seg fram til 85 ár seinni!**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo



Her síggja vit alt húskið:
Elinborg, Wolfang, Sigtór, Ingolvur, Tórhallur
Solveig, Bergtóra, Andrias og Tóta, Thorvald, Kaysten
Rasmina, Tordis, Borghild, Alfred og Hjalgrim

Pápi hittu mammu, Tótu, tá ið hann róði út í Íslandi, soleiðis sum greitt varð frá í fyrsta parti av hesi frásøgn. Hon var av Hafnesstøðni Seyðisfjørðinum, har teir róðu út. Eg haldi, at mamma hjálpti teimum við matgerðini. Tað rann saman teirra millum, og tey munnu hava verið gift umleið 1909. Fyrstu árini búðu tey á Eiði, áðrenn tey fluttu til Norðskála.

### Vit gjørdust 14 systkin og eru vit:

**A** Gvøðni Borghild, 1910-93, g.v. Óla Rasmussen f. 1912 á Kirkju, búðu niðri.

**B** Thordis Adelgunde, 1912-2001, var ógift. Hon var ljósmóðir og búði niðri.

**C** Alfred, 1913-79, var ógiftur og búði við Norðskála.

**D** Hjalgrim, 1914-92, giftist til Klaksvíkar við Turid Samuelsen f. á Hellunum, 1919-2004.

**E** Svend Thorvald, 1915-75, g.v. Petrinu Müller úr Porkeri; tey búðu í Havn.

**F** Solveig, 1917-84, giftist til Keypmannahavnar við Erik Meinertz.

**G** Jonina Rasmina Hansina, 1920-2004, g.v. Alfred Dam, 1915-2003, við Norðskála.

H Kaysten, 1921-76, giftist til Havnar við Solveig Olsen.

**I** Wolfang, 1923-95, g.v. Onnu Petersen, búðu á Argjum.

**J** Bergtóra, 1926, g.v Anton Olsen úr Rituvík. Hann er deyður, men hon býr á Toftum.

**K** Tórhallur, 1928, g.v. Rigmor Dam, f. 1927 við Norðskála; tey búgva á Argjum.

**L** Ingolvur, 1929-2007, g.v. Siggu Djurhuus f. 1933 við Norðskála, har tey hava búð.

**M** Sigtór, 1932-1943. Var føddur við hjartafeili og doyði av tí.

**N** Elinborg, f. 1933, giftist til Danmarkar við Svend Bukhold, sum er deyður. Tey fluttu í 1960-unum til New Zealands, har Elinborg býr.

Húsini vóru smá, og tað var ofta trongt inni, men tað gekk væl ann. Eg vil siga, at vit høvdu ein deiligan uppvøkstur.

Mamma hevði nógv at gera, men systrarnar vóru óførar at hjálpa henni. Vit hjálptu henni eisini, tá ið vit kundu. Tað vóru so nógvir motorpassarar í húsinum og klæðini vóru so skitin. So fóru vit suður á Klett við bust og grønsápu og eini spann við vatni, so skrubbaðu vit tey rein. Grønsápa má vera verðins besta sápa.

Hóast vit vóru so nógv í húsi minnist eg einki til, at vit mangladu nakran mat. Mamma seymaðu eisini klæðir uppá okkum. Hetta gekk mest fyri seg um kvøldini og náttina. Hon nýtti seymimaskinu sum vanligt var tá. Eg haldi, at tað vóru so góðar maskinur. Kvinnurnar vóru so ótrúliga dyktigar og raskar tá í tíðini, og hetta kravdu umstøðurnar eisini.

### Sorgarleikur við Streymin

Eina ferð upplivdu vit ein rættiligan sorgarleik við Streymin. Ein kona á Eiði skuldi eiga, men tað gekk so trupult, at læknabáturin Reyði Krossur varð sendur norður eftir henni. Hann sigldi norður gjøgnum Sundalagið. Hann kom fram við Streymin og til Eiðis í øllum góðum. Men á vegnum suður aftur gekk heilt illa. Tað var kavarok, og doktarabáturin sigldi seg beint á skerið, sum var ella